

## Dysturin var strævin

Alexandur Johansen var ein av bestu spælarunum hjá Skála í dystinum ímóti Start hóskvøldið, og hann var útlúgvaður eftir dystin.

– Hetta var strævið. Teir eru nógv betur fyri kropsliga enn vit, so tað er tungt at spæla ímóti teimum. Serliga í seinna hálvleiki, tá ið teir høvdu bóltin nógv, var tað strævið at renna aftaná teimum, segði hann.

– Úrslitið er á góðari leið. Teir høvdu greiða yvirvág, og eg haldi, at tað hevði verið eitt sindur órættvíst, um vit høvdu fingið javnleik.

## Nú verður betur at flúgva

Start hevði eina keðiliga flogferð til Føroya mikudagin. Leiguflogfarið kom í nógvan turbulens, og spælararnir tóktist verða eitt sindur merktir av flogferðini, tá ið teir komu í land í Vágum.

– Ferðin var einki serlig. Eg haldi, at fleiri av spælarunum vóru ræddir, tí vit komu í nógvan turbulens, segði miðvallarspælarin Fredrik Strømstad eftir dystin á Svangaskarði mikudagin.

Og gleða tit tykkum til at fara á flog aftur í kvøld?

– Ja, í kvøld verður betur at flúgva. Tað er ikki so nógvur vindur, so tað verður eingin trupulleiki.

# í Start



*Todi lúrdi eftir møguleikum í deyðbóltsstøðum. Átta minuttir undan hvíldini royndi hann við saksisparki afturum seg sjálvan. Bólturin streyk framvið stólpanum, og so gjørdist tað ikki málið, sum hevði verið evni til vakrasta málið nakrantíð á Svangaskarði*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

at nytta kann fáast burturúr Toda. Fyri tað mesta hevði hann ryggin móti málinum, tá ið hann fekk bóltin. Hann var lættur at finna og spæla á, og hann dugdi at varðveita bóltin. Trupulleikin hjá Toda var, at tá ið hann hevði fingið bóltin, so vóru viðspælararnir torførir at finna, og tað bar føroyinginum illa til at gera nakað einsamallur, tá ið fyritreytirnar vóru so vánaligar.

Todi lúrdi eftir møguleikum í deyðbóltsstøðum. Átta minuttir undan hvíldini royndi hann við saksisparki afturum seg sjálvan. Bólturin streyk framvið stólpanum, og so gjørdist tað ikki málið, sum hevði verið evni til vakrasta málið nakrantíð á Svangaskarði.

### Luftin fór ongantíð úr

Ofta hevur tað verið soleiðis, tá ið føroysk lið hava royndt seg í altjóða kappingum, at mótstøðuliðini hava fingið eitt mál beinanvegin, og at tey fram móti dystarenda hava fingið fleiri mál. Start fekk mál beinanvegin, men Start fekk einki mál afturat.

Skála átti avgjørt sín heiður av, at tapið gjørdist so tepurt, sum tað kundi gerast. Eftir trilvandi fyrstu løtuna fótaðu teir sær fram ímóti steðginum. Miðvallar uppstillingin var justerað soleiðis, at Levi Hanssen, sum var sera raskur, hjálpti Paula G. Hansen, ið mundi vera ein tann eyðsýndasti, á verjukenda miðvøllinum.

Besta møguleikan í 1. hálvleiki fingu teir í frísparki úr seytjan metrum, men royndin hjá Alexanduri Johansen, sum arbeiddi heilt nógv, fór omanfyri málið.

### Lágt botnstøði

Eftir steðgin var Start beinanvegin tætt við, tá ið innskifti David Hansen sendi í tvørtræið. Hin møguleikin hjá teimum var, tá ið Stefan Bärlin beinanvegin, eftir at hann var skiftur inn, úr eitt sindur spískum í høgru sendi bóltin skeivu megin í síðunetið.

Botnstøðið hjá norska liðnum var lágt, og Skála tók fyri sær. Amatørarnir úr Føroyum vístu sama fótbóltsspæl sum yrkisspælararnir úr Kristiansand. Innskiftu Teitur R. Joensen, Debus Danielsen og blaðungi Erland B. Danielsen, sum royndi seg fyri fyrstu ferð á besta liðnum, krupu ikki undan mótstøðumonnunum.

Men tað eydnaðist ikki at fáa mál. Jónhard Frederiksberg sleit í tí sum einsamallur álopsspælari, Bogi Gregersen arbeiddi nógv aftureftir í høgra borði. Arnhold Berg kom fyri seg sum 1. hálvleikur leið, og Rúni Rasmussen, Milan Curcic og Jóhan Troest Davidsen vóru óførir framman fyri trygga Vlada Filipovic. Onkur skotroynd varð blokerað til horna, og onkra ferðina var tað nær við, at Skála spælararnir rukku fram til innlegg.

Tað gjørdist ikki til meiri enn nær við og næstan. Í Skála leguni fegnaðust teir tó um, at avrikið hevði verið væl betri, enn tað var í landskappingardystinum í Klaksvík. Tað ætlaðu teir at taka við til avbjóðingina í landskappingini nú sunnudagin, og tá ið teir dagin fyri ólavsøkuaftan fara at royna seg í Kristiansand.

**FAKTA**

**Skála-Start 0-1 (0-1)**

**UEFA Cup innleiðandi umfar**
**Hósdagin 13. juli 2006, kl. 19.00 á Svangaskarði**
**0-1:** Marius Johnsen 3.
**720 áskoðarar**
**Dómarabólkur úr Wales:** Brian Lawlor, Michael Jones, Maldwyn Williams og Simon Lee Evans
**Skála:** 1. Vlada Filipovic – 22. Arnhold Berg, 5. Rúni Rasmussen, 11. Milic Curcic, 18. Jóhan Troest Davidsen – 17. Bogi Gregersen, 5. Pætur Dam Jacobsen (4. Teitur R. Joensen, 46.), 16. Pauli G. Hansen, liðformaður (14. Debus Danielsen, 75.), 8. Levi Hanssen, 20. Alexandur Johansen – 10. Jónhard Frederiksberg (9. Erland B. Danielsen, 88.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 12. Eugen Voda, 3. Volmar Poulsen, 7. Rói Jacobsen
**Gult kort:** eingin
**Venjari:** Johan Nielsen
**Hjálparvenjari:** Pauli Poulsen
**Start:** 1. Rune Nilssen – 4. Steinar Pedersen, 17. Lars Martin Engedal, 20. Bård Borgersen, liðformaður, 15. Marius Johnsen – 7. Fredrik Strømstad (25. David Hansen, 46.), 28. Bjarte Lunde Aarsheim, 23. Kristofer Hæstad – 8. Alex Valendia (16. Stefan Bärlin, 78.), 29. Todi Jónsson (19. David Nielsen, 65.), 14. Bala Garba
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 24. Kenneth Høie, 9. Benjamin Nright, 3. Kjetil Ruthford-Pedersen, Kristoffer Paulsen
**Gult kort:** Lars Martin Engedal
**Venjari:** Tom Nordlie
**Hjálparvenjari:** Bård Wiggen

# Todi segði farvæl

**Leikluturin hesa ferð var øðrvísi, enn hann áður hevur verið hjá føroyska Start spælaranum, sum ikki roknar við aftur at spæla á høgum støði í Føroyum**

FARVÆL
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Todi Jónsson segði farvæl við føroyskan fótbólt á hægsta støði hóskvøldið. Áskoðararnir fagnaðu honum, tá ið hann miðskeiðis í 2. hálvleiki varð skiftur út.

– Eg havi glett meg at koma til Føroya við Start. Leikluturin hjá mær var øðrvísi hesa ferð, enn hann plagar at vera. Eg havi altíð verið á føroyska liðnum, og havi havt áskoðararnar við mær, tá ið eg havi spælt her. Nú var eg á mótstøðuliðnum. Vit vunnu 1-0, og vit eiga at hava góðar møguleikar at fara víðari í kappingini, men avrikið var ikki gott. Skála stríddist væl, og tað er hugaligt, at føroysku feløgini hava staðið seg so mikið væl í Europa Cup higartil, staðfesti Todi Jónsson, sum gekk ímillum mongu rásirnar, ið vildu hava prát við hann.

Fyrsta ferðin Todi var við í Europa Cup dysti var í august 1992, tá ið KÍ tapti 3-1 móti Skonto Riga á Svangaskarði. Ta ferðina hevði Todi langt úti frá dundur skot, sum brast í tvørtræið. Síðani hevur hann spælt nógvar Europa Cup dystir, og hann hevur skorað mál í europeisku kappingunum fyri bæði Lyngby og FC:

### Liðugur á landsliðnum

Tað hevur ikki verið heilt greitt, um Todi aftur fer at spæla við landsliðnum, ella um hann heilt er givin. Hóskvøldið staðfesti hann, at tíðin á landsliðnum er liðug:

– Eg eri 34 ára gamal, og tá ið nýggja EM undankappingin verður liðug, verði eg 36. Tá er man ov gamal at dúva uppá. Støðan hjá mær er soleiðis, at tað er sera týdningarmikið at vera í Keypmannahavn saman við familjuni, tá ið eg havi frí frá Start. Eg haldi ikki, at tað hevði borið til at nýtt tíð upp á landsliðið.

Tá ið Todi fer av Svangaskarði fyri síðstu ferð standa fleiri hugaligar løtur eftir í huganum. Ivaleyst mest spennandi løtan mundi tað vera, tá ið Føroyar 6. september í 1995 høvdu vitjan av Russlandi. Tíggju minuttir eftir steðgin stakk Kurt Mørkøre bóltin fram á miðjuna, har Todi setti ferð á. Tað eydnaðist honum at halda mótstøðumenninir aftanfyri seg, meðan hann spurtaði einar fjøruti metrar og síðani setti bóltin framvið russiska málverjanum. Føroyar vóru harvið á odda 2-1. Tá var rómur á Svangaskarði!

